## Hilmar Jan heldur røðu

**Klaksvík:** Hann er vanur at undirhalda, men nú sleppur Hilmar Jan Hansen eisini at royna seg um talara - enntá sum midnáttartalara.

Hetta hendir undir midnáttarsamkomuni leygarkvøldið í sambandi við norðoyastevnuna um vikuskiftið.

Henda samkoman byrjar við kyndlagongu í Vágstún, har Klaksvíkar hornorkestur spælir. Aftaná røðuna verður fýrverkarí á Vágsbø og felagssangur.

**sb.**



## 15 grundøki aftrat

**Norðoyri:** Klaksvíkar kommuna er av álvara farin at gera sítt til at nøkta eftirspurningin eftir grundøkjum í býnum.

Fólk hava víst áhuga at búseta seg á Norðoyri, og har kommunan bæði hevur - og fer - at gera fleiri øki byggibúgvin.

Á vegnum á Fløtum eru sjey øki nú gjørd byggibúgvin, og í ovaru síðu av vegnum er ætlanin at gera átta aftrat í næstum.

**sb.**

# Brúk er fyri vinnulívsráðnum

**Hóskvøldið helt Vinnulívsráðið í Klaksvík aðalfund sín. Fundarfólkið var púrasta samt um, at tørvur er á einum Vinnulívsráði í størsta fiskivinnubýi okkara.**

VINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** - Tað er brúk fyri ráðnum, serliga tá hugsað verður um tær stóru broytingarnar, sum longu eru at merkja og sum koma at merkja Klaksvík í framtíðini.

- Hesa broytingarnar fara at síggjast aftur, bæði innan vinnuna, men eisini innan mynstrið við búsetingum.

Hetta var nakað av tí, sum varð tikið fram á hesum fundinum, sum í roynd og veru varð hildin sama dag sum Íverksetarahúsið í Klaksvík alment varð tikið í nýtslu.

Hetta skuldi alt verið tekin um, at møguleikar eru fyri at býurin kann menna seg enn meiri í framtíðini. Hesa gongdina ynskir Vinnulívsráðið somuleiðis at verða við í.




*Jógvan við Keldu hevur altíð stríðst fyri vinnulívinum í Klaksvík. Her hevur hann orðið, tá Íverksetarahúsið varð tikið alment í nýtslu í farnu viku*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Á fundinum bar Jógvan við Keldu seg undan afturvali. Hann hevur annars verið formaður nærum øll árini, síðani Vinnulívsráðið varð stovnað fyri 15 árum síðani.

Nógv hevur verið tosað um týdningin av Norðoyatunlinum og hvørja ávirkan hesin hevur havt og hevur á menningina í Klaksvík.

Staðfestast kann, at samskiftið til og úr býnum er meiri enn 10-faldað síðani apríl mánað í fjør.

- So tað er greitt, at næststørsti býur okkara er mitt í eini stórari broytingartíð. Her er tað uppgávan hjá ráðnum at fylgja við gongdini.

- Vit ynskja eisini at vera við til at skorða undir, soleiðis at Klaksvík kann mennast í hesi broytingartíðini. Vit vilja gera okkara til at býurin fær eitt positivt vinnuumhvørvi, varð sagt.

Ella sum tann eini nevndarlimurin, Rani Nolsøe tekur til: - Fær vinnulívið teir bestu karmarnar, so levera tey eisini tað besta frá sær!

Í Klaksvík eru í dag umleið 300 partafeløg, sum takast við mangar ymiskar vinnur. Serliga eru tað fiskivinnan og tænastur, sum eru knýttar at henni, sum sermerkja vinnulívið.

Nývalda nevndin í Vinnulívsráðnum er eisini rættiliga breitt umboðað. Í henni sita Karl Birgir Isaksen frá KBI, Rani Nolsøe frá Íverksetarahúsinum, Hilmar Danielsen frá El-in, Elsebeth Poulsen fra NFCS og Heini Hansen frá Com-Data.

# Skil fáast á parkeringina

**Í næstum verður lýst eftir fólki, ið skal virka sum parkeringsvørður í Klaksvík. Hetta samtykti Klaksvíkar býráð á fundi í gjárkvøldið**

FERÐSLA
*Orð & mynd: Snorri Brend*

**Klaksvík:** Eitt uppskot um ein slíkan parkeringsvørð hevur verið tikið fram við millumbilum í ferðslunevndini.

Her hava eisini verið hildnir fundir við sýslumannin, varapolitiinspektørin, borgarstjóran, býarverkfrøðingin og býráðsskrivarin um sama málið. Nú er so umsíðir líkt til, at tað verður loyst úr lagdi.

Á fundi fyrr í mánaðin tók tekniska nevndin í býráðnum undir við tí, og tað sama gjørdi ferðslunevndin.

Mælt varð til, at lýsa eftir parkeringsvørði og at fútin haraftrat fekk áheitan um hetta. Og tað verður so gjørt í næstum.




*Ein parkeringsvørður skal nú setast at fáa skil uppá parkeringina í Klaksvík*